

Kvinnur sum Sharon Stone verða lagdur undir at pynta nógv um sína útsjónd við skurðviðgerðum og aðrari viðgerð

# Alt fleiri vilja broyta sína útsjónd

Eitt er at pynta seg til jóla, nakað annað er at gera eina varðandi kosmetiska broyting í andlitinum ella á kroppinum.

Men tað, sum tóktist óveruligt fyri bara fáum árum síðani, er blivið alt meira vanligt, og nú eru tað ikki bara filmsstjørnurnar, sum hugsa um at leggja seg undir skurð fyri at broyta ella betra um útsjóndina.

Ein kanning, sum felagið AC Nielsen hevur gjørt, vísir, at sætti hvør dani umhugsar at fáa eina vakurleikaskurðviðgerð, og um nøkur ár verður tað kanska líka vanligt at fáa eina innspræing av Botox fyri at fáa ringastu rukkurnar burtur, sum at fara til frisør.

Kanningin vísir, at í flestu londum er tað blivið meira vanligt at fáa sær skurðviðgerð fyri at varðveita ungu útsjóndina, og tað eru bæði kvinnur og menn, sum vilja sleppa framat.

Russarar eru sambært kanningini teir, sum drøyma mest um vakurleikaviðgerð, tú heili 48 prosent umhugsa at gera okkurt við útsjóndina. 37 prosent av grikkum, 31 prosent av írum og 20 prosent av svium gera tað sama.

- Fólk leggja alt størri dent á, hvussu tey síggja út, um hetta rákið heldur fram, verður tað um 20 ár líka vanligt at vitja ein plastikkirurg, sum at fara til ein frisør, sigur Ivar Michaelsen, sum er stjóri fyri AC Nielsen.


























